Umboð fyri Hanstholm á vitjan

– Vit hava gjørt íløgur fyri 25 milliónir í havnina í Hanstholm í sambandi við nýggju Norrønu, og hesa íløgu vilja vit fáa sum mest burturúr, sigur Bent Hansen, amtsborgmeistari í Viborg amt

Ejner Frøkjær v.m., borgarstjóri í Hanstholm , og Bent Hansen, Amtsborgmeistari í Viborg Amt, hava í vikuni verið í Føroyum og fundast við føroyskar politikara og føroyskt vinnulív

VITJAN
Heri á Rògvi

Komandi vár verður nýggja Norrøna latin Smyril Line. Skipið skal nýtast til sigling til og úr Føroyum. Ein av havnunum, ið nýggja eins og gamla Norrøna fer at vitja, er Hanstholm á vestursiðuni av Jútlandi.

Hanstholm hoyrir til Viborg Amt. Bent Hansen er amtsborgmeistari í Viborg Amt og annar næstformaður Socialdemokratiet. Seinastu dagarnar hevur hann verið á vitjan í Føroyum saman við umboðum fyri Hanstholm kommune.

Á vitjan sínari í Føroyum hevur Bent Hansen verið á fundi við løgmann, Anfinn Kallsberg, Bjarna Djurholm, landsstýrismann í vinnumálum, Smyril Line og umboðum fyri føroysku fiskivinnuna. Hann var m.a. á fundi við Vestlax, ið hevur stóran týdning fyri Viborg Amt við teirra stóru virkjum.

Bent Hansen letur sera væl at fundunum í Føroyum.

– Fundirnir hava verið fyrireikandi fundir. Eg haldi, at vit hava tosað sera væl saman, og vit gleða okkum til eitt gott samstarv í framtíðini, sigur Bent Hansen.

Umframt at kunna føroyingar um viðurskiftini í Hanstholm, so hava Bent Hansen og hansara fólk eisini tosað við føroysku umboðini um ymisk sløð av víðkaðum samstarvi.

– Vit vilja fegnir varðveita og víðka handilssamstarvið við føroyingar. Á fundunum hava vit eisini tosað um annað samstarv. Millum annað hava vit tosað um samstarv í sambandi við okkara felagsáhugamál í Norðsjónum. Vit eru longu virknir í felagsskapum hesum viðvíkjandi, og tað vildi verið upplagt, at føroyingar eisini gjørdist partur av hesum, sigur Bent Hansen.

Hann sigur, at embætisfólkini nú fara at hyggja nærri at, hvussu og á hvørjum økjum eitt samstarv kann millum Føroyar og danska amtið. Hann nevnir bæði møguleikan at samstarva við Tórshavnar kommunu og aðrar partar av Føroyum.

Stóra íløgu

Fyri Hanstholm og fyri Viborg Amt hevur Norrøna stóran týdning.

– Vit hava gjørt íløgur fyri 25 millónir í havnina í Hanstholm í sambandi við nýggju Norrønu, og hesa íløgu vilja vit fáa sum mest burturúr, sigur Bent Hansen.

Amtsborgmeistarin metir, at nýggja Norrøna fer at skapa øktan akitivitet í Hanstholm og í Føroyum.

– Vit vilja sjálvandi, at sum mest av nýggjum aktiviteti verður skaptur í Hanstholm, nú nýggja Norrøna fer at sigla. Nýggja Norrøna merkir samstundis eisini nýggjar møguleikar fyri føroyska samfelagið. Møguleiki verður fyri at gera Føroyar munandi meiri kendar í Danmark og aðrastaðni, metir Bent Hansen.

Ferðalagið við Bent Hansen fór av landinum hósmorgunin.

Endurskoða vápnalógina

Í tinginum mikudagin var munnligur fyrispurningur frá Niklláa Petersen, løgtingsmanni, til Høgna Hoydal, landsstýrismann, um vápnalógina avgreiddur.

Niklái Petersen vísti á, at fleiri syndarligir tilburður høvdu verið í útlondum, har heilt ung høvdu skotið frá hond við skotvápnum. Hann vildi, hvørjar ætlanir vóru á økinum í Føroyum.

Høgni Hoydal greiddi frá, at tað í næstum verður settur ein arbeiðsbólkur, sum skal fara undir arbeiðið at endurskoða vápnalógina. Arbeiðsbólkurin verður mannaður í samstarvi við løgregluna, sum ætlar at seta eitt fólk burturav at taka sær av hesum arbeiðinum.

Elttør besta boðið

Eyðun Elttør gjørdist tann stinnasti tipparin av føroysku politikarunum, men ikki langt frammanfyri Heina O. Heinesen

TIPPING
Heri á Rógvi

Eins og navnin Hjalgrím Elttør var Eyðun Elttør nær við at tippa rætta úrslitið í dystinum millum Føroyar og Skotland. Til næsta dystin hjá landsliðnum mugu hinir politikararnir venda sær til hansara eftir ráðum um fótbóltsúrslit
Mynd: Finnur Justinussen

Í Sosialinum í gjár og á portal.fo fingu føroyskir politikarar høvið til at gita, hvat úrslitið gjørdist millum Føroyar og Týskland.

Øll vóru tey samd um, at Týskland fór at vinna, men ivamálið var bara, hvussu nógv.

Jóannes Eidesgaard, formaður í Javnaðarflokkinum, roknaði við, at týskarar at enda fóru at vera seks mál frammanfyri føroyingar. Lisbeth L. Petersen, formaður í Sambandsflokkinum, og Jenis av Rana, formaður fyri Miðflokkin, hildu bæði tvey, at Týskland fór at vinna við trimum málum móti ongum.

Formaðurin fyri tingbólkin hjá Tjóðveldisflokkinum, Heini O. Heinesen. nevndi tvey úrslit, tá hann skuldi gita – 1-0 og 2-1! Tá avtornaði tók hann 1-0 framum. Hann segði seg vera vísan í, at talan fór at gerast um eitt tepurt tap.

Eyðun Elttør, formaður fyri Sjálvstýrisflokkin, gitti, at Føroyar fingu eitt mál, men hann var ikki í iva um, at týskarar at enda fóru at sigra. Hann gitti, at úrslitið fór at gerast 3-1 til týskararnar.

Politikararnir vóru eisini spurdir um, hvønn týdning teir meta, at føroyska landsliðið hevur fyri Føroyar. Teir vóru allir á einum máli um, landsliðið hevur ómetaliga stóran týdning fyri marknaðarføringina av Føroyum uttanlands.

Hóast Heini O. Heinesen nevndi rætta úrslitið, so mugu vit vera strangir og bert loyva einum boði frá hvørjum luttakara, og tí fær Eyðun Elttør frá okkum heiðurin at vera besti politiski tipparin hesaferð.

Føroyska bylgjan floymur yvir Ísland

Fleri konsertir við føroyskum tónlistafókum eru í íslandi í hesum døgum og føroyska bygjan, nevnd Fairwaves, ger vart seg plakatum og í fjølmiðlum

TÓNLEIKUR
Dagfinn Olsen

Hanus G. Johansen, Eivør Pálsdóttir Band og Kári Sverrisson og Mikael Blak hava leikt í Austurbæjarbio, sum er niðurlagt filmshøli, og føroysku konsertirnar halda fram.

Leygardagin 19. oktober klokkan 15 fara Clickhaze og Krit á pall í Smáralind í Kópavági og sama kvøld fara Clickhaze og A.R.T. á pall á Grand Rokk í Reykjavík.

Tann 26. oktober fara Clickhaze og Krit á pall í Austurbæjarbio og eisini aðrar konertir eru ætlaðar, men eru ikki fastlagdar enn, sigur Jens Guð, sum er tónleikaserkønur og sum er kendur í Føroyum frá sínum ferðum her. Hann hevur skrivað nógv um Íslendskan og føroyskan tónleik.

Jens Guð sigur, at í hesum døgum er vónleyst at hyggja í eitt blað, ella at skrúva frá í sjónvarpi ella útvarpi, uttan at hoyra um føroysku tónleikararnar.

Miðbýurin í Reykjavík er eisini merktur av Fairwaves og plakatir gera vart við føroysku bylgjuna.

Jens Guð sigur, at øll bløðini skriva um føroysku tónleikararnar og Fréttablaðið hevur mynd av Eivør Pálsdóttir á forsíðuni og tvær síður um songkvinnuna inni í blaðnum. Ríkisútvarpið spælir í hesum døgum eini 10-15 føroyskar sangir um dagin, sigur Jens Guð úr Íslandi, har føroyska bylgjan leikar.

Eivør Pálsdóttir ger vart við seg í Íslandi í hesum døgum
(Mynd: Finnur Justinusen)



Íslendski Jens Guð, sum hevur vitjað í Føroyum fleiri ferðir, sigur, at í Íslandi hoyrist nærum bert um Føroyar og føroyskan tónleik í hesum døgum
(Mynd: Jens Kr. Vang)

Leygardagin hava vit opið frá kl. 11.00-15.00

Í hesum sambandi hava vit nógv góð brúktbilatilboð m.a. hesi

Mitsubishi L300 2,5D km. 161.000, árg. juni 1994 70.000,- LEYGARDAGIN 50.000,-	Jeep Cherokee 2,5TD km. 80.000, árg. juli 1997 135.000,- LEYGARDAGIN 120.000,-	Seat Cordoba 1,9SDI STC. 5H km. 39.000, árg. aug. 1999 125.000,- LEYGARDAGIN 85.000,-
Suzuki Baleno 1,3I 4h km. 27.500, árg. apr. 2000 108.000,- LEYGARDAGIN 91.000,-	Citroen ZX 1,9TD 5H km. 160.000, árg. 1997 89.000,- LEYGARDAGIN 80.000,-	Citroen Jumper 2,5TD LH km. 120.000, árg. aug. 1996 120.000,- LEYGARDAGIN 105.000,-
Citroen Xantia 1,9D km. 120.000, árg. aug. 1997 106.000,- LEYGARDAGIN 95.000,-	Peugeto 306 D 4H km. 150.000, árg. apr. 1995 60.000,- LEYGARDAGIN 52.000,-	Mitsubishi Galant 1,8GLSI km. 167.000, árg. 1992 35.000,- LEYGARDAGIN 32.000,-

Møguleiki er eisini fyri at royna nýggjar bilar

Vælkomin til

Vit hava fleiri aðrar bilar á goymslu

CITROËN Mercedes-Benz

Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo